16. apríl 2004

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 5/2004

Tíð: Hósdagin 15. apríl 2004, kl. 13 - 15

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 4/2004 setursráðsfundi 31. mars 2004.** Góðkend við rættingum í pkt. 5.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Menningarætlanin.** (J.nr. 0017-01332). *Fundarskjøl: Uppskot MM, dagfest 1.4.2004, 2 s. Broytingaruppskot HPJ, dagfest 7.4.2004 , 2 s.*
Uppskot um eina ítøkiliga, raðfesta menningarætlan, sum skal galda fyri 2004 og 2005.

Uppskot um at raðfesta KT-tænastudeild í 2004, rúm er ikki fyri fleiri tiltøkum innanfyri fíggjarlógaruppskotið. Semja um hetta.

Drúgt orðaskifti um raðfestingina fyri 2005. Kjakið stóð serliga um, hvørt KT-frøði ella løgfrøði skuldu raðfestast ovast. JPJ vildi raðfesta Løgfrøði ovast. HPJ vildi raðfesta KT-frøði og Lívtøkni ovast.

Niðurstøðan var, at ráðið raðfesti soleiðis:
1. KT-frøði
2. Løgfrøði
3. Lívtøkni
4. Fjølmiðlan

Grundgevingarnar fyri at raðfesta KT-frøði fyrst vóru:

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

- BS útbúgving er í gongd við adjungerðaðum fólki. Tørvur er á at fáa næsta holdið í eina tryggari legu við fastari manning.
- møguleiki at knýta tættari bond við Handilsskúlan
- møguleiki at knýta bond við vinnuna
- møguleiki at tiltrekkja eksterna fígging til granskingar- og menningarverkætlanir

Uppskotið varð rættað til málsliga og samtykt. Kunna um ætlanina m.a. í fjølmiðlunum. Setursráðið skrivar í felag grein til miðlarnar sum íkast til orðaskifti um gransking. Taka støði í orðingunum í samgonguskjalinum um gransking

Frágreiðing: Annika Sølvará